## Fuglafjarðar skúli

# Fyribilsstarv sum varaskúlastjóri

Í sambandi við at varaskúlastjórin fer í farloyvi, verður starvið sum varaskúlastjóri í Fuglafjarðar skúla lýst leyst til setanar í tíðarskeiðnum 1. august 2008 til 31. juli 2009.

**Søkt verður eftir varaskúlastjóra, sum**
- undir ábyrgd og í samstarvi við skúlastjóran skal taka lut í teirri fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluni í skúlanum
- dugir at samstarva og er fyrikomandi
- er fúsur at taka á seg uppgávur í samstarvi við og eftir fyriskipan skúlastjórans.

**Harumframt skal varaskúlastjórin**
- vera næsti medarbeiðari skúlastjórans
- saman við skúlastjóranum átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- undir fráveru skúlastjórans hava ábyrgdina av leiðslu skúlans
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- saman við skúlastjóranum skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava læraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag í lønarflokki 32.2 og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann, sum sett/-ur verður, er tænastumaður frammanundan.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

Umsóknir við ljósriti av prógvum og CV og møguligum viðmælum skulu verða sendar skúlanum.

Freistin at søkja er 16. juni 2008 kl. 10

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Súna í Hjøllum, skúlastjóra, á telefon 737761 ela við at senda teldupost til suni@ffs.fo

Í Fuglafjarðar skúla verða komandi skúlaár umleið 290 næmingar í 16 flokkum, og her koma at starvast 34 fólk.

## Fuglafjarðar skúli

**Postboks 9 · FO-530 Fuglafjørður · Tlf. 737760**

**Fuglafjarðar skúli** hevur komandi skúlaár umleið 290 næmingar í 16 flokkum, og her koma at starvast 34 fólk. Áhugaði kunnu lesa meira um skúlan á heimasíðuni: www.ffs.fo

# Sp/f Plan

Søkt verður eftir royndum maskinførara.
Koyrikort krevst.
Byrjað skjótast gjørligt

**TLF. 21 49 37**

**Føroya Studentaskúli og HF-skeið**

Hoydalar · FO-188 Hoyvík
Telefon 312973 - Telefax 318624
Teldupostur skrivstovan@hoydalar.fo
Avgreiðslutíð: Kl. 08.00 - 15.30

# Skúlatænari til Føroya Studentaskúla í Hoydølum

Eitt starv sum skúlatænari er leyst at søkja á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði frá 1. august 2008.

**Uppgávur**
Uppgávurnar eru: Umsjón við og røkt av bygningunum hjá stovninum, at røkja økið uttan um bygningarnar, eftirlit við hita-, vatn- og elskipan skúlans og at rigga til høli í sambandi við próvtøkur og onnur tiltøk og at vera til handa í dagligu viðurskiftum skúlans. Skúlatænararnir arbeiða í skiftandi vaktum og tí koma skeivar arbeiðstíðir regluliga fyri. Á skúlanum koma frá 1. august at starvast 3 skúlatænarar og verandi 1. skúlatænari er leiðari fyri skúlatænararnar og reingerðarstarvsfólkið.

**Førleikar**
Tann, ið settur verður eigur at hava handverkaraútbúgving, gott yvirlit og góð evni at samstarva. Ávísur telduførleiki er ein fyrimunur. Fyri tann rætta persónin er talan um eitt spennandi og fjølbroytt starv við nógvum avbjóðingum.

**Løn**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Handverkarafelag/Landsfelag Handverkaranna. Starvið verður at seta frá 1. august ella skjótast til ber.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Mikkjal Helmsdal, rektara, telefon 312973 ella Holgar Johansen, skúlatænara, fartelefon 214613.

Umsóknir við prógvum, viðmælum og frágreiðingum um arbeiðsroyndir skulu sendast til Føroya Studentaskúla og HF-skeið, Sanatoriivegur 1, FO-188 Hoyvík, ella sum teldupostur til skrivstovan@hoydalar.fo og skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi mánadagin 15. juni, kl. 12.00.

umhvørvisstovan

# Adressur í Húsavíkar kommunu

Sambært § 7 í løgtingslóg nr. 17 frá 6. mars 2002 um adressur, er adressuskráin fyri bygdirnar Húsavík, Dalur og Skarvanes í Húsavíkar kommunu góðkend.

Skráin er almenn og tøk á www.us.fo.

**Landsadressuskráin**
Boks 2048 · Tlf. 342400
FO-165 Argir
www.us.fo · us@us.fo

# Sølufólk/Lærlingur

## til Málingahandilin í Havn

Søkt verður her eftir sølufólki/lærlingi til Málingahandilin við landavegin í Havn.

Hevur tú hug at selja máling, tapet, persiennur o.a?

So er tað møguliga tær vit leita eftir.

Málingahandilin søkir eftir lærlingi ella sølufólki at byrja skjótast tilberð.

Vit hava selt máling síðan 1962, og ætla at selja máling í nógv ár enn.

Fyrimunur er um tú hevur royndir við máling og koyrikort til persónbil.

Krav til at blíva lærlingur er at tú hevur FHS útbúgving.

Eru spurningar, so eru tygum altíð vælkomin at ringja 313825 og spyrja eftir Helga á Reynatrøð.

Málingahandilin við landavegin. Tlf 313825

VØRUHÚSIÐ
**Litaval P/F · Box 1019 · 100 Tórshavn**

# Frítíðaravloysari

Frítíðaravloysari m/k, søkist til fyritøku okkara frá ½ juni til ½ august til ymiskt fyrifallandi arbeiði.

Løn sambært sáttmála við S & K.

Send okkum eina umsókn, ella støkkið inn á gólvið áðrenn 12. juni 2008.

**Sp/f Lützen's Timburhandil**
**Skálatrøð 16 · 110 Tórshavn**
**Tlf. 31 10 20**

Sosialurin
www.sosialurin.fo



# Motorsúkkla

Suzuki SV1000, maj 2007, 1400 km,
sera væl hildin, til sølu fyri kr. 90.000.

**Ring ella send SMS til 541235**